# ítróttur

Nr. 112 • hósdagur • 16. juni 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo


## Nýtt heimsmet á 100 metrum

Asafa Powell gjørdist í týskvøldið heimsins skjótasti maður nakrantíð.

Hetta gjørdist veruleiki, tá ið Powell, sum er av Jamaica, setti nýtt heimsmet á 100 metra teininum í renning í einari kapping í grikska høvuðsstaðnum Athen.

Asafa Powell rann teir 100 metrarnar í tíðini 9,77 sekund, og harvið slóg hann trý ára gamla metið hjá amerikumanninum Tim Montgomery, ið var 9,78 sekund.

*tn*

# Hannis skal venja H71

**Hoyvíkingar hava gjørt avtalu við Hannis Wardum um at taka sær av besta liðnum hjá felagnum komandi kappingarár.**


HONDBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*


Nú er greitt, at tað verður Hannis Wardum, sum komandi kappingarár skal standa við róðrið hjá besta mansliðnum hjá H71. Hannis hevur ongantíð áður roynt seg sum venjara í bestu deildini, men hann hevur drúgvar royndir sum spælari, og somuleiðis hevur hann instruktørskeið frá ítróttarháskúlanum í Århus.

### Spentur uppá avbjóðingina

Hannis Wardum var í mong ár fastur fúsur á besta mansliðnum hjá Kyndli, sum seinast í áttatiárunum og gjøgnum øll nítiárini bardist við vestmenningar um plássið á ovastu rók í føroysku manshondbólti. Nú eru nøkur ár síðani, at Hannis leikti í bestu deildini, og seinnu árini hevur hann saman við beiggjanum Una verið eitt av bestu dómarapørunum, ið vit hava havt í Føroyum.

Spurdur um tað er ein gamal dreymur at gerast venjari í fremstu deildini, sigur Hannis: - Tað veit eg ikki rættuliga. Eg havi so altíð fylgt væl við og havt mína meining um, hvussu tingini skulu gerast, sigur hann.

Hannis Wardum sigur, at hann er sera spentur uppá avbjóðingina. - H71 hevur nógv og gott fólk. Talan er um ein rættuliga stóran hóp, og tað er ógvuliga umráðandi eftir mínum tykki. Somuleiðis tykist tað fyri mær sum um, at spælararnir eru ógvuliga seriøsir, og tað hevur nógv at siga, sigur Hannis Wardum. Nýggi venjarin fegnast eisini um, at flestallir leikararnir hjá H71 eru í góðari venjing, tí fleiri teirra rógva um summarið, og nakrir venja miðvíst við hondbóltslandsliðnum, so grundformurin skuldi verið heilt góður, tá ið lagt verður til brots aftur við fullari megi eftir ólavsøku.

Spurdur hvat málið hjá H71 fyri komandi kappingarár er, sigur Hannis: - Nú eri eg uppvaksin í Kyndli, og har eri eg vanur við, at man altíð fer eftir tí besta. Eg vil tó siga, at eitt pláss millum trý tey fremstu er á eini góðari leið, sigur nýggi H71-venjarin.



*Hannis Wardum skal fyri fyrstu ferð royna seg sum venjara í bestu mansdeildini, tá ið hann komandi kappingarár skal taka sær av mansliðnum hjá H71.*

*savnsmynd*

### Liðskiparin fegnast

Halgir Dahl-Olesen, liðskipari hjá H71, fegnast um, at felagið hevur sett Hannis Wardum í starvið sum venjari hjá besta mansliðnum:

- Vit eru ógvuliga glaðir um avgerðina, og ikki minst fegnast vit um, at tað ikki verður ein leikandi venjari, ið stendur við róðrið komandi ár. Eg trúgvi eisini, at Hannis er rætti maðurin til at geva okkum eitt spark í afturpartin, tá ið ástendur. Vit hava eitt gott lið, og tí haldi eg, at vit hava líka nógv tørv á einari sterkari persónligheit sum einum royndum venjara. Eg vildi eisini mett, at Hannis ikki góðtekur nakað, sum er hálvt, men sum allatíðina krevur, at vit geva 100 prosent, og tað hava vit brúk fyri, sigur Halgir Dahl-Olesen.

H71-liðskiparin sigur, at spælararnir eru sera glaðir fyri, at venjaraspurningurin er loystur, tí tað er ein sannroynd, at tað er ógvuliga trupult at fáa fatur á góðum venjarum í dag.

---

## KÍ fær danskan styrk

**Klaksvíkingar fáa um nakrar vikur tilgongd av ungum leikara úr næstbestu donsku deildini.**


FÓTBÓLTSSTYRKUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*


Talan er um 20 ára gamla Mathias Tauber, sum kemur úr felagnum Ølstykke í donsku 1. deildini. Hetta skrivar Norðlýsið á heimasíðu sínari mikudagin.

### Skal styrkja verjupartin

Mathias Tauber er miðvallari/verjuleikari, og hann kemur til Klaksvíkar tann 2. juli. Við Norðlýsið sigur Petur Simonsen frá Sp/f KÍ-fyriskipan, at partarnir eru vorðnir samdir um samstarv, og hóast teir seinastu formalitetirnir ikki eru avgreiddir, so kann hann vátta, at danin verður í Klaksvík 2. juli.

KÍ hevði ætlað at fáa danan til Klaksvíkar beinan vegin, men Ølstykke vildi ikki lata hann leysan, fyrr enn sáttmálin teirra millum gekk út, og kappingin í Danmark var liðug.

Mathias Tauber hevur spælt 20 dystir fyri besta liðið hjá Ølstykke.




*Ungi Mathias Tauber, sum frá 2. juli verður við í hópinum hjá KÍ.*

*mynd: www.olstykke-fodbold.dk*

## Altjóða dómari úr Rituvík

**Føroyskur fimleikur hevur fingið sín fyrsta altjóða dómara í rútmiskum/estetiskum fimleiki. Elna Johannesen úr Rituvík hevur fyri kortum verið í Prag og lokið prógv sum altjóða dómari.**


FIMLEIKUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*


Estetiskur fimleikur er av álvara við at vinna fram her á landi. Herfyri vóru ikki færri enn trý føroysk fimleikalið í Danmark og tóku lut í HM-kappingini í estetiskum fimleiki, og nú hava vit so eisini fingið fyrsta altjóða dómaran í hesi kappingargrein.

### Ætlar sær út at døma

Elna Johannesen greiðir frá, at hon var á einum tveir dagar longum skeiði í kekkiska høvuðsstaðnum Prag. Skeiðið endaði við einari skrivligari próvtøku, og síðani vóru skeiðsluttakararnir settir at døma út frá eini sjónbandaupptøku.

- Vit sótu ein og ein og hugdu at bandinum, og síðani skuldu vit lata inn okkara úrslit. Tað var í veruleikanum sum ein vanlig próvtøka, greiðir Elna frá.

Herfyri fekk Elna at vita frá IFAGG, sum er alheimssambandið innan hesa ítróttargrein, at hon hevði staðið royndina sum altjóða dómari á 3. stigi, og tí kann hon nú fara út at døma í altjóða kappingum.

- Eg ætli mær út at døma, og í veruleikanum eri tað eg sjálv, sum geri av, nær eg fari út at døma altjóða kappingar, greiðir Elna frá. Hon skal bert umvegis Fimleikasamband Føroya boða frá, at hon fegin vil døma í eini kapping, og so kann hon fara, greiðir hon frá.